## Finnur og Høgni á pistutiltaki í Århus

**Í sambandi við pisuveitsluna hjá Føroyingafelagnum í Århus spæla Finnur Jensen og Høgni Reistrup í Áarstovu**

PISUVEITSLA

Leygarkvøldið verður árliga pisuveitslan hjá Føroyingafelagnum í Århus. Tað ljóðar óivað sum ein púra vanlig veitsla, har nakrir útisetar koma saman. Men Pisuveitslan í Århus hevur nú nógv ár á baki, og tað er mest av øllum fyri at varðveita tær, at navnið eisini framvegis er pisuveitsla. Tí veitslan er fyri øll áhugað - eisini fleiri árs gamlar pisur á Århus leiðini, sigur Føroyingafelagið í Århus í tíðindaskrivi.

Tiltakið verður fyriskipað við borðhaldi, og tiltakið plagar at vera sera væl vitjað

### Finnur og Høgni

Tónleikur fer eisini at seta sín serliga dám á tiltakið í Århus leygarkvøldið. Forsangararnir úr Lawetz og Páll Finnur Páll hava stungið høvdini saman, nú teir báðir eru lesandi í Århus. Teir báðir, Finnur Jensen og Høgni Reistrup, hava ikki spælt saman áður, men havi nú funnið saman tónlistarliga í Århus. Teirra tónleikastílur minnir ikki sørt um hvønn annan, og tað tók heldur ikki drúgva tíð, áðrenn teir sungu sama lag.

Høgni Reistrup telist millum mest evnaríku føroysku tónleikararnar. Hann gjørdi fyrst vart við seg í klassiskum høpi við Føroya symfoniorkestur. Hann slegði av álvara sítt navn fast við bólkinum Lawetz, sum brakaði víðari í Prix Føroyar kappingini við teirra eyðkenda tónleiki.

Finnur Jensen er kendur sum forsangari í Páll Finnur Páll, og hann hevur eisini roynt seg sum einstaklingur. Hansara eyðkendu tekstir eru ikki fyri veikar sálir, og tað verður sjálvandi eisini okkurt frekt lag at hoyra í Áarstovu.

Fleiri upplýsingar á www.aarstova.dk

## Føroyskur dansur í Skansastovu

**Nú kvøldini gerast myrk og long fer føroyski dansurin aftur í sving í Skansastovu í Havn**

FØROYSKUR DANSUR

Felagið Tøkum Lætt bjóðar øllum áhugaðum at vera við til føroyskan dans í Skansastovu í Djóna í Geilsgøtu í Havn.

Felagið sigur, at miðað verður ímóti, at skráin verður so fjøltáttð sum møguligt við styttri vísum og tættum, umframt teimum longru kvæðunum. Tiltakið er sostatt bæði fyri roynd og óroynd.

Dansað verður nú sunnukvøldið tann 2. oktober, og annað hvørt sunnukvøld frammyvir í Skansastovu, Djóni í Geilgøtu 1 sigur nevndin í Tøkum Lætt.

## FNU kalla til eykaaðalfund

**20. oktober verður eykaaðalfundur í Føroya Náttúruverndarfelag**

UMHVØRVI

Fimm limir í felagnum høvdu skrivliga gjørt FNÚ vart við, at teir ikki mettu, at valið av nevndini á aðalfundinum á Læraraskúlanum leygardagin tann 16. apríl 2005 var farið fram, sum felagsins viðtøkur fyriskriva.

Grundað á vantandi samskifti við nevndina kallaðu limirnir inn til eykaaðalfund í Norðurlandahúsinum leygardagin tann 24. september 2005 kl. 15.00.

Á fundinum vóru førd fram sjónarmið um, at aðalfundurin ikki var farin fram sambært viðtøkum felagsins. Eisini vóru mannagongdinar, tá íð limir kalla inn til eykaaðalfund, umrøddar.

Limirnir eftirlýstu eina størri profilering av sjónarmiðunum hjá FNÚ, m. a. eisini støðutakan til ætlaðu vatnorku-útbygging Eiði 2.

Fundurin samtykti, at lýsast skal til eyðkaaðalfund at verða hildin hósdagin hin 20. oktober 2005, sigur Føroya Náttúruverndarfelag, FNÚ, í tíðindaskrivi.

# Føroyar kunnu útflyta seyðaskinn til ES

**Váttan er nú komin um, at Føroyar kunnu útflyta seyðaskinn til ES. Spurningurin varð reistur á fundi mánadagin millum Føroyar og ES, og týsdagin váttaðu ES-myndugleikar, at hetta letur seg gera, um føroyingar fylgja ávísum fyriskriftum**

SEYÐASKINN



*Týsdagin seinnapartin kom váttan úr ES um, at Føroyar aftur kunnu útflyta seyðaskinn til ES. Sostatt skuldi einki verið til hindurs fyri, at føroyingar útflyta seyðaskinn longu í ár, um tey finna keyparar til skinnini*

Føroyar kunnu nú aftur útflyta seyðaskinn til ES-marknaðin. Týsdagin seinnapartin kom váttan úr ES um hetta, og sostatt skuldi einki verið til hindurs fyri, at føroyingar útflyta seyðaskinn longu í ár, um tey finna keyparar til skinnini.

Tað eru ávísar fyriskriftir, sum mugu fylgjast. Eitt nú skulu 21 dagar ganga, áðrenn móttakarin kann taka ímóti seyðaskinninum frá tí at seyðurin er flettur. Skinnini skulu eisini hava ligið fyri seg hesa tíðina og váttan frá djóralækna skal fyriliggja um hetta.

Málið var reist á fundi mánadagin 26. september millum Føroyar og eina ES-nevnd í aðalráðnum fyri heilsu- og brúkaramál.

Fyri Føroyar luttóku Hákun J. Djurhuus og Sonja J. Jógvansdóttir vegna Sendistovu Føroya í Evropasamveldinum og Bjørn Harlou, landsdjóralækni.

Hákun J. Djurhuus og Bjørn Harlou greiddu frá støðuni viðvíkjandi seyðaskinnum.

Eitt ES-umboð lovaði at kanna málið sum skjótast og vendi aftur seinnapartin týsdagin við váttandi svari og treytunum fyri innflutningi.

### Treytir

Treytirnar fyri at útflyta seyðaskinn til Evropiska marknaðin eru, at ein djóralækni skal vátta, at seyðaskinnini ikki eru av seyði, sum hevði sjúkueyðkenni, sum kann smitta menniskju ella djór, ella at skinnini eru av seyði, sum er slátraður fyri at burturbeina sjúku, sum kann smitta menniskju ella djór.

Somuleiðis eru ásetingar um, hvussu skinnini antin skulu vera turkað ella saltað. Tað ber sostatt ikki til at útfylta fersk seyðaskinn til ES-marknaðin.

Seyðaskinnini skulu heldur ikki hava verið í samband við aðra djóraframleiðslu ella livandi djór, sum eru í vanda fyri at hava smittuberandi sjúku.

Til ber at síggja yvirlit yvir treytirnar í ES lóggávuni: Regulation (EC) n°1774/2002 of the European Parliament and of the Council of 3 October 2002, sum seinast er dagførd í 2005.

Til ber at lesa meir um hetta á hesi slóðini:

http://europa.eu.int/eur-lex/lex/LexUriServ/site/en/consleg/2002/R/02002R1774-20050315-en.pdf

Sostatt skuldi málið um seyðaskinnini nú verið loyst, siga Sendistova Føroya í Evropasamveldinum og Landsdjóralæknin í tíðindaskrivi.

# Rowan á REX

**Fyrsta føroyska veruleikasjónvarpsstjørnan Róin Siggertson spælir hetta vikuskiftið í Maxim. Fyrrverandi Rockidols stjørnan, spælir í tveimum heilt ymiskum útgávum á REX**

KONSERT

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Fríggjakvøld verður Cultural kvøld við Rowan á REX. Aftan fyri navnið Rowan goymir Róin Siggertson seg, og fríggjakvøldið fáa føroyingar høvið at hoyra, hvat ein av okkara gávuríku útiseta tónleikarum tekst við.

Áðrenn the Dreams vóru í MTV, áðrenn Guðrun Sólja vann Stjerne for en Aften, áðrenn Eyð Berghamar Jacobsen var í Stjerne for en aften og Popstars, Áðrenn Jákup Dam var í Stjerne for en aften, ja sjálvt áðrenn Sissal pissaði á gólvið og varð við barn í Big Brother, var ein sending á TV3, ið æt Rockidols. Har gjørdist Róin fyrsta føroyska veruleikasjónvarps stjørnan. Við síni rokk'n'roll attitútu og sterku útstráling, var Róin áskoðarafavorittur til at vinna sær plássið, sum sangari í fyrsta danska veruleikasjónvarpsrokkból kinum. Men hann gjørdist ov stuttur.

Síðan tá hevur Rowan spælt nakrar ólavsøkukonsertir, og havt framførslur á dansistøðum og ølklubbum. Nú er eitt sindur fráliðið síðan seinast, men fríggjakvøldið verður altso høvi at hoyra hansara egnu funky løg.

Róin gjørdist stjørna í Føroyum, tá hann 16 ára gamal gav sítt fyrsta kasettuband út. Saman við vinmanninum Magna Christiansen hevði ungi vestmenningurin tikið kassettubandið upp við egnum løgum og onkrum Beatles lagið. Bandið gjørdist landaplága, og Róin og Magni spældu nógv til dans kring Føroyar.

Tá teir góvust við Róin og Magna, spældi Róin nógv til dans saman við ymiskum tónleikarum. Eitt nú var hann ofta at hoyra í Maxim, ið lá í Alberts Hall. Hetta er ikki tann síðan av Róini, sum hevur verið mest virkin seinastu árini, har egin tónleikur og tónleikaframleiðsla hava verið høvuðsarbeiðið hjá Róin.

Men Leygarkvøldið sleppa vit so at uppliva dansisíðuna av Rowan, tá hann fer á pallin at spæla góðan dansitónleik til eitt Maxim kvøld. Tiltakið verður tó ikki í fíggjarmálaráðnum men í REX.

Manningin í bólkinum bæði kvøldini er: Róin Siggetsson (sang og ljómborð), Pauli Magnussen (Bass og kór)

Uni Debes (Gittar og sang/kór) Brandur Jacobsen (Trummir)

Sí heimasíðuna www.sassymusic.dk, har tónleikur og sjónbandaløg við Rowan eru at hoyra og síggja, millum sjónbandaløgini eru tríggjar upptøkur av Ólavsøkukonsertini.